## Meiri harðskapur og stuldur

Mars mánaður var heldur harðligur hjá íslendsku løgregluni. Hagtølini fyri mánaðin vísa, at løgreglan fekk boð um 29 prosent fleiri tilburðir við harðskapi enn í mars í fjør. Somuleiðis vísa hagtølini, at løgreglan fær altsamt fleiri fráboðanir um stuldur. Í síðsta mánaði vóru tær 306 í tali ímóti 266 í mars í fjør. Hinvegin vóru færri mál um rúsevni. Løgreglan hevði 139 rúsevnamál í síðsta mánað ímóti 168 í mars í 2007 og 156 í mars í 2006.



## Forvitnislig vitjan úr Klaksvík

Hoyvík: Komandi sunnukvøld verður møtið í samkomuni Oasuni í Hoyvík, har klaksvíkingar fara at luttaka við talu og sangi. Á møtinum tala Poul Færø og Jóhan Magnus Rasmussen, meðan Kvartettin úr Betesda í Klaksvík syngur. Aftaná møtið verður ein, drekkamunnur at fáa.

# Hvalbiartunnilin fær ferðsluljós

**Nú verður arbeitt við at seta ferðsluljós upp í Hvalbiartunnilin, so at tað bara verður loyvt at koyra annan vegin ísenn fyri at sleppa undan, at proppur kemur í av tí at bilar møtast inni í tunlinum**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsverk kannar nú eftir um tað ber til at seta ferðsluljós upp í Hvalbiartunlinum fyri at bøta um ferðslutrygdina.

Tað hevur Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, upplýst í Løgtinginum.

Endamálið við ferðsluljósunum er at tað bara skal vera verða loyvt at koyra annan vegin ísenn fyri at sleppa undan ferðsluproppi, tá ið bilar møtast í tunlinum.

Sostatt verður ferðslan einvegis norðureftir í nakrar minuttir og aftaná verður ferðslan einvegis suðureftir í nakrar minuttir.

Tað vóru teir báðir løgtingsmenninir Johan Dahl og Jacob Vestergaard, sum vildu hava av vita frá landsstýriskvinnuni, hvat ætlanin er at gera fyri at bøta um ferðslutrygdina í teimum gomlu tunlunum.

Bjørt Samuelsen staðfesti, at tað er so mikið dýrt at dagføra teir gomlu tunlarnar, at í flestu førum loysir tað seg betri at byggja nýggjar tunlar.

Men hon segði, at í løtuni er Landsverk í ferð við at kanna, hvørji fyribils tiltøk kunnu verða sett í verk fyri at bøta um trygdina í Hvalbiartunlinum.

Í hesum sambandi verður eisini kannað um tað hevði verið ein brúkilig loysn at sett ferðsluljós upp við Hvalbiartunnilin.

Í øllum førum helt hon, at ein ferðslu-ávaringarskipan av onkrum slagi er harðliga tiltrongd.

Tað liggur í kortunum, at okkurt skal gerast, men hon kundi kortini onki siga um, nær nakað verður gjørt fyri ferðslutrygdina í Hvalbiartunlinum.

Annars staðfestir hon, at á fíggjarlógini skal meiri peningur setast av til ábøtur á tunlar, vegir og brýr kring landið.



*Hvalbiartunnilin er einsporaður, og tað elvir mangan til ferðsluppropp, tá bilar møtast inni í tunlinum, serliga stórir bilar. Nú verður roynt at finna eina loysn fyri at sleppa undan hesum trupulleikanum*

# Ivasamt um leirvíkingar fáa sín vilja

**Samgongan vil ikki lova leirvíkingum, at vegaføringin ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin verður gjørdur omanfyri bygdina, sum meirilutin í bygdaráðnum vil**

NORÐOYATUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er ivasamt um leirvíkingar fáa sín vilja um at vegaføringin ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin, skal leggjast omanfyri bygdina.

Tað framgekk av einum kjaki í Løgtinginum nú ein dagin.

Tað var Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, sum vildi hava at vita, hvat samgongan ætlar at gera við vegaføringina ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin

Fyrst var semja í Leirvíkar Bygdarráðið um at leggja vegin í ein tunnil undir bygdina, men tað varð kolldømt í Løgtinginum, tí tað skuldi vera ov dýrt.

Ístaðin fyri hevur Løgtingið samtykt at gera vegin niðri í bygdini fyri í mesta lagi 40 milliónir krónur.

Kári P. Højagaard vísti á, at tað seinasta er, at meginparturin av bygdarráðnum í Leirvík vil hava vegin omanfyri bygdina, men hesum hevur meirilutin í Løgtinginum ikki viljað lurtað eftir.

Men Tá ið Bjørt Samuelsen svaraði, helt hon seg mest til løgtingssamtyktina, sum er gjørd um at leggja vegin niðri í bygdini.

Hon segði eisini, at tær ognartøkur, sum tað var neyðugt at fremja í hesum sambandi, eru gjørdar.



*Meirilutin í bygdaráðnum í Leirvík vil hava vegin til Norðoyatunnilin lagdan omanfyri bygdina, men Landsstýril vil ikki lova, at ynskið verður fylt*

Kortini segði hon, at síðani samtyktin varð gjørd, eru prísirnir hækkaðar og at hon tí helst verður noydd at biðja Løgtingið um eina eykajáttan fyri at kunna fremja ætlanina.

Hon metti, at kanska verður neyðugt um eina eykajáttan upp á 10 milliónir.

Hinvegin helt hon eisini, at sama hvør loysn verður vald, koma vit í stríð við fólkaræðið, tí tað seinasta er, at meirilutin í Leirvíkar bygdaráð hevur mælt til at gera vegin omanfyri bygdina og tað er eisini álvarsamt ikki at lurta eftir leirvíkingum.

Hon legði afturat, at á fíggjarlógini fyri 2009 er ætlanin at seta nóg mikið av peningi av til at gera vegin lidnan fyri.

Andreas Petersen, løgtingsmaður, vísti á, at Landsstýriskvinnan hevði eitt at gera og tað er at fylgja tí, sum er samtykt um at gera vegin niðri í bygdini.

- Tann samtyktin er gjørd eftir tilmæli frá einum meiriluta í bygdaráðnum í Leirvík.

Alfred Olsen staðfesti, at verður nú neyðugt við eini eykajáttan, kostar vegurin nú næstan tað sama sum ein tunnil undir bygdini hevði kostað og sum semja upprunaliga var um.

## Spara næstan helvtina av útreiðslunum

**Sleppa lemmatrolarar at partrola, kunnu teir spara ein stóran part av útreiðslunum, men tað er ein spurningur, sum má umhugsast serstakliga væl**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*áki@sosialurin.fo*

Sleppa teir stóru lemmatrolararnir at partrola, kunnu teir spara næstan helvtina av útreiðslunum.

Tað hevur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í tilfeingis-og fiskivinnumálum, upplýst í Løgtinginum.

Tinglimir umrøddu spurningin um kreppuna, sum fiskiflotin er við at koma upp í av tí, at oljan er blivin so ovurhonds dýr at raksturin ber seg ikki longur við tað, at tað er ikki meiri enn at bátarnir fiska fyri olju longur.

Lemmatrolararnir brúka nógva olju og tí er trupulleikin serliga stórir hjá teimum.

Og verða lemmatrolararnir bundnir við bryggju, fer tað at raka Suðuroynna serliga hart, tí har tað eru har, at teir flestu lemmatrolararnir eru.

Í hesum sambandinum hevur spurningurin verið umrøddur um at lata teir stóru lemmatrolararnar sleppa at partrola.

Tórbjørn Jacobsen segði, at hann hevði fingið at vita frá vitandi fólki á økinum, at sleppa lemmatrolararnir at partrola, kundi hvør trolari spart 15% av útreiðslunum til reiðskap og upp í 30% av útreiðslunum til olju.

- Sostatt er talan um eina ógvuliga stóra sparing.

Kortini heldur hann, at talan er um ein spurning, sum má umhugsast serstakliga gjølliga.

- Eitt, sum vit mugu gera okkum greitt, er, hvar hendan partrolingin skal vera. Talan má vera um eina skipaða partroling, soleiðis at ein stórur partur av einum skipabólki ikki endar inni á hjá einum øðrum bólki, tí so fær ongin nakað burtur úr.